gult cyan magenta svart

Kyndil-VÍF 15-34 (8-14)

Kyndil var› hølva› av

Kyndil megna›i bert at fylgja VÍF í gott korter. Eftir hetta var spurningurin bert, hvussu stórur sigurin hjá útili›num skuldi ver›a

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Líkt er til, at kvinnuli›i› hjá Kyndli er í svárari kreppu í løtuni.

Li›i›, sum seinnu árini hevur havt fast pláss á føroysku hondbóltstindunum tapti aftur sunnudagin, og VÍf fór ikki fram vi› m‡kindum, tá tær fingu møguleikan at vinna stórsigur.

Fóru ni›ur vi› høvdinum

Fyrstu løtuna var annars ikki nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um nakran uppvísingardyst hjá gestunum.

Kyndil fekk beinan vegin fatur á í verjupartinum, og hóast ta› onkuntí› tóktist tungt í álopspartinum, so megna›u tær so nøkunlunda at fylgja vi› í málskjótingini.

Ta› tóktist tó, sum um ta› bert var ein spurningur um tí›, fyrr enn kreftirnar hjá heimali›num fóru at ganga undan, og hetta hendi eisini, tá fyrri hálvleikur var farin at halla.

Seinastu løtuna undan ste›ginum øktu vestmannagenturnar úr 7-6 upp í 14-8, og tá Kyndil so bert fekk eitt mál fyrsta korteri› av seinna hálvleiki var lagt upp til ein ordiligan umgang.

Endaliga stø›an gjørdist, at 19 mál vóru á muni, og ta› man í øllum førum vera langt sí›ani, at Kyndil hevur tapt somiki› dyggiliga.

Ta› tóktist tó onganti›, sum um kyndilskvinnurnar vildu gera naka› serliga fyri at for›a stórtapinum.

Gaman í høvdu tær vææl fatur á fyrstu løtuna, men tá tær so mistu taki›, fóru tær eisini ni›ur vi› høvdinum. Strí›sviljin, sum ofta hevur havt so nógv at siga á li›num var at kalla burtur, og tí slapp VÍF rættiliga at hóreiggja sær.

Vi› fullari fer›

Fyri VÍF tykist sigurin bert at vera enn eitt fet á lei›ini móti gullmerkjunum, sum tær í løtuni er grei›ir favorittar at vinna, tó at Stjørnan helst eisini ætlar sær at siga okkurt or›i› her.

Spæli› hjá VÍF tykist í øllum førum at gerast betri fyri hvønn dyst, sum gongur. Verjan riggar væl, eins og álopsparturin kanska er hin sterkasti í landinum. Serstakliga eru ta› mongu skjótálpini, sum gera sítt til, at mótstø›uli›ini ver›a koyrd ni›ur. Bæ›i kropsliga og sálarliga, men yvirhøvur tykist talan at vera um eina væl virkandi heild, sum ta› ver›ur sera torført hjá hinum li›unum at basa.

Komandi vikuskifti› ver›ur helst avgjørt, hvat av teimum bá›um oddali›unum skal halda vetrarfrí á fremsta plássinum. Tá kemur Stjørnan til Vestmanna, og líti› er at ivast í, at ta› her ver›ur talan um ein sannan toppdyst vi› øllum tí, sum har til hoyrir.

Torført at gera naka› vi›

Fyri Kyndil var talan um tri›ja tap á ra›, og felags fyri hesi er, at talan í øllum førum hevur veri› um grei› tap.

Ta› byrjar at likjast eini sannari kreppu, og venjarin hjá kyndilskvinnunum, Birgir Hansen, vil heldur ikki avsanna›, at so er.

– Kreppa er kanska eitt heldur sterkt or› at b‡ta, men ta› er greitt, at tr‡ tap av hasum slagnum ávirka leikararnar, heldur hann.

– Vit hava eisini havt sera vánaligar umstø›ur sein astu tí›ina. Ska›ar hava gjørt sítt, og heldur ikki hava allar fingi› vant vi› fullari fer›, tí for›ingar av ymsum slag hava stungi› seg upp. Tá man so samstundis spælir móti teimum trimum fremstu li›unum, so kann ta› nærum ikki ver›a ø›rvísi.

Hvussu Kyndil kann úr aftur kreppuni, hevur venjarin sum so onga beinlei›is uppskrift upp á.

– Kanska er ta› gott hjá okkum, at vetrarfrítí›in nú fer at nærkast. Tá fáa vit so eitt sindur av hvíld, og ta› hava leikararnir helst gott av.

– Á›renn hetta hava vit tó nakrar dystir at avgrei›a, og ikki minst hevur ta› stóran t‡dning, at vit vinna fjór›ingsfinaluna í steypakappingini, har vit skulu hitta Neistan.

Umframt fjór›ingsfinaluna, skal Kyndil eisini royna seg móti Neistanum og Tjaldri í landskappingini, og einki er at taka seg aftur í, at hesir dystir skulu vinnast, um Kyndil ætlar sær at hanga í hinum li›unum. Lætt ver›ur ta› undir ongum umstø›um, og serliga man ta› vera sálarliga, at kyndilsli›i› skal reisa seg.

Um tær megna hetta, er ta› tó bert tí›in, sum kann vísa.

Me›an VÍF hevur sett beina kós móti ovastu tindunum, er stø›an í Kyndli mest átøk einari kreppu í løtuni

Mynd: Álvur Haraldsen

Dytsturin í tølum

Málskjúttar:

Kyndil: Signhild Petersen 4, Jórun Ludvig 4, Jensia Petersen 3, Brynhild Klein 2, Ann Hansen 1, Anita Kjærbo 1

VÍF: Sóley› Mikkelsen 9(5), Nicoleta Radu 7, Ioana Rapa 6, Frí›a Marjunardóttir 5, Nicolina Ey›bjørnsdóttir 4, Johanna Høgnesen 2, Randi Kúrberg 1

Brotskøst: VÍF 5

Útvísingar: Kyndil 3, VÍF 1

Dómarar úr Tjaldri: Dánjal Hansen og Kári Hansen. Ta› hev›i veri› ynskiligt, um teir revsa›u har›ari, tá spælarar ver›a dømdir fyri at halda.

Strævi› hjá VB

Dysturin millum VB og Tjaldrur, sum skuldi spælast sunnudagin, var› avl‡stur, og januar mána›i ver›ur nú sera strævin hjá VB

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Hóast ítróttarliga gongdin hjá VB hevur veri› hampuliga gó› seinastu tí›ina, so eru tey alt anna› enn væl nøgd fyri tí›ina har su›uri.

Orsøkin er, at ta› ikki eydna›ist at avgrei›a dystin móti Tjaldri sunnudagin, og at ta› tískil er líkt til, at li›i› skal spæla ikki færri enn sjey dystir í januar mána›i. Hetta er treyta› av, at VB vinnur komandi fjór›ingsfinaluna í steypakappingini, har tær skulu hitta Tjaldur.

Ringt ve›ur

Orsøkin ,til at dysturin var› útsettur, var, at runavíkingar mettur ve›ri› vera ov ringt til at fara su›ur, og tí vór›u avbo› send vágbingum.

Annars hóttu dómaravi›urskiftini eisini vi› at avl‡sa dystin, men sum vit hava skilt, so var hetta tó fingi› í rættlag, so dysturin kundi avgrei›ast.

Dennis Holm sigur vegna VB, at tey hava sent Hondbóltssambandinum bræv, har tey gera vart vi› sína ónøgd um, at dysturin solei›is er útsettur, men enn vita vit ikki, hvørja stø›u HSF hevur til hetta.

Orsøkin til ónøgdina er fyrst og fremst, at tey í VB ikki meta, at ve›ri› var somiki› vánaligt, at ta› gjørdi fer›ingina hjá Tjaldri somiki› strævna, at dysturin skuldi avl‡sast av teirri orsøk.

Í Vági eru tey ónøgd um avl‡singina av dystinum móti Tjaldri. Ikki minst, tí ta› nú er líkt til, at VB skal spæla sjey dystir í januar mána›i

gult cyan magenta svart

Anand og Khalifman út í umdyst

Í New Delhi, India, er spenningurin í hásæti nú fjór›ingsfinalurnar í Fide HM eru leiktar. Bert bretin Michael Adams hevur vunni› sær sæti í hálvfinaluni, me›an hini tr‡ plássini mugu avgerast vi› umdystum.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Alexander Khalifman og Viswanathan Anand telva›u mánakvøldi› umdyst

Fide heimsmeistarin frá 1999, Alexander Khalifman úr Russlandi, vil ei víkja fyri trifremsta telvaranum í heiminum Viswanathan Anand úr India. Í fyrsta talvinum teirra millum har Khalifman hev›i svarta fólki›, fekk hann lættliga javnt, og sunnudagin bleiv úrsliti› somulei›is javnt.

Khalifman hevur ment seg øgiligt sí›ani hann í fjør óvænta› vann Fide HM, og nú á døgum ver›ur hann mettur millum tíggju teir fremstu í heiminum, sjálvt um ratingtal hansara liggur um 2660. Torført er at siga um hann megnar at basa Anand í kviktalvsumdystinum, eftirsum hesin er kviktalvsekspertur, men møguleikan hevur hann so. Kviktalvsumdystirnir blivu leiktir mánadagin eftir evstamark.

Grischuk og hinir

Vinnarin av 3rd Tórshavn International russin Alexander Grischuk, hevur veri› størsta yvirraskilsi í Fide HM. Hann er ein av teimum átta í kvartfinaluni, og skal somulei›is út í kviktalvsumdyst eftir tveir javnleikur ímóti franskmanninum Vladislav Tkavhiev. Sera flott av tí 17 ára gamla Grischuk sum saman vi› javnaldranum Ruslan Ponomariov, ver›ur spáddur eina stjørnubjarta framtí› innan topptelving.

Spaniólin Alexei Shirov var í trupulleikum undan seinna talvinum ímóti Evgeny Bareev, somulei›is úr Russlandi. Bareev vann nevnliga fyrra talvi› og krav Shirovs var› sostatt at vinna ta› seinra. Shirov vísti seg, ikki óvænta›, frá sínari bestu sí›u í hesum seinna talvi› og stutt sagt knústi frá hond í einum klassiskum álopstalvi. Tískil ver›ur umdystur teirra millum, og Shirov er helst favorittur. Seinna talvi› sum Shirov vann, er vi› í bla›num í dag.

Tann einasti i› kom snikkaleysur í hálvfinaluna var› bretin Michael Adams. Hann vann ta› fyrra talvi› og leikti ta› seinna javnt ímóti Veselin Topalov úr Bulgaria.

Adams leikar ímóti vinnaranum av Anand-Khalifman umdystinum- í hálvfinaluni, me›an hin hálvfinalan ver›ur millum tveir av hesum f‡ra telvarum: Shirov, Bareev, Tkachiev og Grischuk.

Fide HM byrja›i 25. november og sí›sta talvi› ver›ur leikt 27. desember. Finalan ver›ur flutt til Teheran, Iran.

Føroyingar á odda í Danmark

1. li› hjá Talvfelagnum Føroyum í keypmannahavn liggur á odda í 3. deild í donsku li›kappingini. Útisetali›i› vann sunnudagin enn ein stórsigur, hesafer› 5,5-2,5 ímóti Ballerup, sum annars vóru tvey stig framanfyri føroyska li›num undan dystinum.

Tríggir dystir hava føroyingarnir telva›, og eru tveir av teimum enda›ir 6-2, me›an hesin tri›i kærkomni sigurin gav teimum hálvtsætta stig.

Li›i› var: John Arna Nilssen (remis), Heina Olsen (tapti), Flóvin Tór Næs (vann), Ey›un Nolsøe (remis), Bogi Ziska (remis), Heini Danielsen (vann), Carl Eli Nolsøe Samuelsen (vann) og Finnbjørn Vang (vann).

Eins og í føroysku li›kappingini er jólaste›gur í danskari li›telving, og byrja› ver›ur aftur mi›skei›is í január 2001.

Talvi› hesa vikuna

Shirov,A (2746) - Bareev,E (2702)
FIDE WCh KO New Delhi IND 10.12.2000

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Nc3 Nf6 4.Bg5 dxe4 5.Nxe4 Be7 6.Bxf6 Bxf6 7.Nf3 Nd7 8.Qd2 0-0 9.0-0-0 Be7 10.Bc4 Nf6 11.Rhe1 Nd5 12.Ne5 f5 13.Bxd5 exd5 14.Nc5 Bg5 15.f4 Bf6 16.h3 Qd6 17.Ncd3 b6 18.g4 c5 19.g5 Bd8 20.Qg2 Rb8 21.g6 c4 22.Nb4 Bb7 23.gxh7+ Kxh7 24.Rg1 Qh6 25.Qf3 Bf6 26.Nd7 Rbd8 27.Nxf8+ Rxf8 28.Nxd5 Kh8 29.Qa3 1-0